BURTURMIST
Tann, ið av misgáum tók ein svartan, teknaðan Fjällräven, við tveimum myndatólum, smyrsli og ymiskum øðrum í, í Mimir 17. apríl, vinarliga ring. Tað er sera umráðandi.
Tlf. 61141, Ketty

BRILLUR BURTURMISTAR
Er tað nakar, sum hevur funnið einar brillur í stálhúsa á vegnum av Vágsheyggi til Kósina, so ring
Tlf. 57228

BURTURMIST
Hevur nakar funnið eitt damuur við gull leinkju? Vinarliga sig frá á
Tlf. 14642

BARNAPUNGUR
Lítil, hálvrundur, hvítur lakkpungur við lítlum, kámum, reyðum hjarta »love« á, og summarfugli á síðuni, funnin í Gundadali. Kr. 47,25 eru í. Miðstovnurin í Gundadali,
Tlf. 16042

Býli

LÍTIL ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Tórshavn sum skjótast.
Tlf. 32251

TIL LEIGU
Nýmálað íbúð, við ljósi og hita bíliga tilleigu til edrúiligt, tilkomið mannfólk.
Tlf. 17798, eftir kl. 18

UMBÝTING
Hevur tú eini hús, helst í Jyllandi, hevði tú so havt hug at býtt um við eini hús í Tórshavn frá uml. 25. juni og 3 vikur fram?
Tlf. 17139

TIL LEIGU
Eldri hús í Kommunubrekku í Klaksvík til leigu frá 1. mai.
Tlf. 55424

KLAKSVÍK!
Par við tveimum børnum søkir hús ella íbúð til leigu í Klaksvík frá 1. juli.
Tlf. 15633, frá kl. 17

KAMAR YNSKIST
til leigu í Keypmannahavn frá 1. juni og nakrar vikur fram.
Tlf. 21105

FERÐIST Í SANDOY
Góð frítíðarús í Húsavík. Allir hentleikar. Standa væl fyri, bilin til dyrnar.
Tlf. 55565 - 61050

KEYPMANNAHAVN
3 rúms íbúð til leigu á Oyrasundskollegiinum í juli og august. Allir hentleikar eru í íbúðini. Kostnaður 1.000 kr. um vikuna.
Tlf. 13664, Annlina

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarligt par søkir íbúð í Havn ella á Argjum. Prísuppskot: max. 3.000 kr. við ljósi og hita.
Tlf. 10875, eftir kl. 15

TIL LEIGU
Frítíðarhúsini »Máliteigurin« á Viðareiði til leigu. Njótið náttúruna, útsýni yvir allar Norðoyggjarnar, ein perla fyri ferðamannin. Allir hentleikar. Rímuligur prísur.
Tlf. 56532 - 56939

YNSKIST
Lítil íbúð ella stórt kamar søkist sum skjótast.
Tlf. 16606

HÚS Í KLAKSVÍK
til leigu frá 1. juli. Standa sentralt.
Tlf. 57172

HÚS YNSKJAST
til leigu í Klaksvík frá 1. juli.
Tlf. 10838, eftir kl. 17

ÍBÚÐ ELLA HÚS
ynskist til leigu í Havn ella á Argjum skjótast gjørligt.
Tlf. 71364

FRÍTÍÐARHÚS
Hugnalig frítíðarhús í Gøtu til leigu í styttri ella longri tíðarskeið.
Tlf. 57727 ella 41098

FRÍTÍÐARHÚS Í KUNOY
Hugnalig frítíðarhús í Kunoy til leigu.
Tlf. 56809 ella 57727

SØKT VRÐUR
eftir stórari íbúð ella húsi til leigu í Keypmannahavn frá august.
Tlf. 13940

LIÐAHUSINI I NOLSOY TIL LEIGU
Setið prikkin yvir vikuskiftið ella frídagarnar við at njóta nakrar dagar í gomlu og hugnaligu Liðahúsunum í Nólsoy. Njótið náttúruna og gestablídnið á bygd og gerið vitjanina til eitt upplivilsi fyri lívið. Í Liðahúsunum eru allir nútímans hentleikar.
Tlf. 48001 ella 27030

STÓR ÍBÚÐ Í KOLLAFIRÐI
til leigu frá 1. juni. 2.000 kr. um mðr. v/ olju.
Tlf. 21620, best eftir kl. 18

NÝGGJ HÚS Á STRONDUM
bíliga til leigu.
Tlf. 49259

HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST
Par við tveimum børnum søkir hús ella íbúð.
Tlf. 14954, best eftir kl. 17

GÓÐ ÍBÚÐ Í REYKJAVÍK
til leigu í summar frá 30. mai til 13. juni og frá 18. juli til 15. aug.
Inga Rósa Joensen, Sólvallag. 29, 101 R.vík
Tlf. 621737

FRÍTÍÐARHÚS VIÐ GJÓGV
Njótið eitt vikuskifti ella meira við Gjógv, í vøkrum og óspiltum umhvørvi, í gomlum, hugnaligum húsum við øllum nútímans hentleikum, fyri ein sámuligan kostnað.
Tlf. 21060

TIL LEIGU
150 kvm. stór hús í Saltnesi til leigu til edrúilig fólk skjótast gjørligt. 2.000 kr. um mðr. u/ ljós og hita.
Tlf. 47888

HYGG HER!
Einlig kvinna søkir íbúð í Havn. Prísuppskot 2.000–3.000 kr. um mðr. v/ ljósi og hita.
Tlf. 16152, kl. 17–19

HÚS TIL LEIGU
Eitt plans hús í vesturbýnum til leigu frá 1. juni.
Tlf. 18706

ÍBÚÐ YNSKIST
Tilkomin kvinna ynskir góða íbúð í vestara parti av býnum.
Tlf. 12224

HÚS ELLA ÍBÚÐ
ynskist til leigu á Argjum skjótast gjørligt.
Tlf. 17087 ella 16171

HÚS Í VESTURBÝNUM
til leigu frá 1. mai. 5 min. gongd frá miðbýnum.
Tlf. 16262
Tlf. 15933 í arbeiðstíð

Dýr

TVEIR BORDER COLLIE
hundahvølpar av góðum seyðahundaslagi bíliga til sølu.
Tlf. 61543

TVEIR SERA FITTIR KETTIRLINGAR
verða latnir djóravinum.
Tlf. 43207

TVEIR HUNDAHVØLPAR
hundur og tík, 6 vikur gamlir, mamman av lítlu terrie slagi, pápin colli, bæði still og rólig, verða latnir djóravinum.
Tlf. 61259

FITTIR KETTLINGAR
verða latnir djóravinum.
Tlf. 44245

SERA FITTIR HUNDAHVØLPAR
undan lítlari tík verða latnir djóravinum ókeypis.
Tlf. 73672, eftir kl. 18

KETTLINGUR YNSKIST
Angora ella siamesiskur kettlingur ynskist til keyps.
Tlf. 19194

HØSNARUNGAR
Tveir dagar gamlir, til sølu.
Tlf. 44363

BORDER COLLIE
hundahvølpar til sølu.
Tlf. 61133

FRENSAKETTLINGUR
verður latin djóravini. Hann er ljósabrúnur og hvítur og dugir at leppa.
Tlf. 12022

MARSVÍN UNGAR
til sølu fyri 100 kr. stk.
Tlf. 15767, spyr eftir Elinborg

TÍKARHVØLPAR
Sera fittir tíkarhvølpar undan spakari, lítlari tík fáast við at koma eftir teimum í Granagøtu 4, Tórshavn.
Tlf. 15941

COLLIE HUNDAHVØLPAR
verða latnir djóravinum. (Lagdir 24. apríl).
Tlf. 71760

Húsarhaldstól

SINGER
seymimaskina til battarí, 385 kr. Maskina at seyma knappar, 320 kr. Bindimaskina, 3.850 kr. Bøtimaskina til klæði, 400 kr.
Tlf. 12122

250 L FRYSTIBOKS
bíliga til sølu.
Tlf. 14329

TIL SØLU
Lítil gass bakarovnur og eitt gassbluss bíliga til sølu.
Tlf. 44173

TIL SØLU
Lítið brúkt Zanussi vaskimaskina, 2 ára gomul, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 18945

KØLISKÁP YNSKIST
til keyps. Max. 1 m høgt, 57 cm breitt.
Tlf. 19317

TIL SØLU
Væl viðfarin komfýrur, tvey ára gamal, og ein eitt ára gomul roykhetta bíliga til sølu.
Tlf. 74199

ATLAS UPPVASKIMASKINA
til 12 pers., lítið brúkt, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 27187 ella 27179

VØLUND STRÚKIRULLA
til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 14492 - 15600

MIELE TURKITRUMLA
til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 14492 - 15600

Innbúgv

SOFABORÐ
við flísum á, til sølu fyri 600 kr. Nýprísur 2.700 kr.
Tlf. 74199

LEÐUR HORNASOFA
bíllga til sølu.
Tlf. 14329

KELIM TEPPI
170x240, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 16451

TIL SØLU
Lítið brúkt hvítt klæðiskáp bíliga til sølu.
Tlf. 18813

TIL SØLU
Sovisofa við skuffum, 600 kr. Lítið reolsystem til ungfólk, við plátu at draga út til skriviborð, 600 kr. Super-Quick madrassa, 75x190.
Tlf. 13940

YNSKIST
Leður hornasofa og stólur, í góðum standi, ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 45147

TIL SØLU
Stór, antik, mahogni kommoda v/ 3 skuffum & marmorplátu, til sølu fyri 1.500 kr. Mahogni náttborð v/ marmorplátu, 1.000 kr.
Tlf. 19874, eftir kl. 18

Pløgg

BARNAMØTTIL
4–6 ár, til sølu.
Tlf. 13765

Súkklur

YNSKIST
Eykalutir til Yamaha knallert, sum t.d. stempul og cylindari og møguliga aðrir ynskjast bíliga til keyps.
Tlf. 44571, eftir kl. 16

YNSKIST
Yamaha í góðum standi, møguliga við eykalutum, ynskist til keyps.
Tlf. 52031

SÚKKLUR YNSKJAST TIL KEYPS
Vælhildnar barnasúkklur ynskjast til keyps: gentusúkkla til 10 ár og dreingjasúkkla til 5–6 ár við hjálpihjólum.
Tlf. 10565

TIL SØLU
Lítið brúkt fjaliasúkkla (24 tummar) v/ 15 gearum og stoytdoyvarum framman, í sera góðum standi, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 32551

HARRASÚKKLA
Spildurnýggj súkkla, ið hevur kostað 3.000 kr., verður seld fyri 2.000 kr.
Tlf. 49516

TIL SØLU
Nýggir eykalutir til súkklu: 2 hjól, 28", 3 gear, saðil, bagasjuberari, keta, alt fyri 600 kr.
Tlf. 47397

BMX-SÚKKLA
16", í góðum standi, til sølu fyri 700 kr., og Juventus barnasúkkla, 12,5", í hampuligum standi, fyri 300 kr.
Tlf. 10161

KNALLERT YNSKIST
Puck Maxi ella onnur knallert ynskist til keyps. Kann hava brek.
Tlf. 15141
Tlf. 10939, heima

DAMUSÚKKLA
Hvít Kildemose súkkla v/ 3 gearum, lítið brúkt, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 14215

YNSKIST
Hevur nakar eina Yamaha knallert at selja mær? Hon skal vera í sera góðum standi.
Tlf. 48423

FJALLASÚKKLA
til mannfólk til sølu. 18 gear, Shimano C 50, næstan nýggj, í góðum standi.
Tlf. 33241

SÚKKLA TIL SMÁGENTU
4–6 ár, í góðum standi, til sølu fyri hægsta boð.
Tlf. 33241

YNSKIST
Yamana knallert í góðum standi ynskist til keyps.
Tlf. 16967

Teldur

COMMODORE 64
við 2 joystickum, 2 bandupptakarum og nógvum spølum til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 10162

386 TELDA
1 Mb SVGA grafikkkort, SVGA skermur, 4 Mb ram, 1050 Mb SCSi2 - harddisk, bøkur og programm til sølu.
Tlf. 18747, kl. 16–20

YNSKIST
Amiga 500 v/ litskermi og spølum ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 18997

TIL SØLU
Commodore 64: bandspælari, 2 joystick og nógv spøl.
Tlf. 73686

TIL SØLU
Stórt og gott telduborð við hjólum bíliga til sølu. Kann justerast upp og niður.
Tlf. 43040, eftir kl. 18

TIL SØLU
Super Nintendo við 4 spølum og 1 joypad, í góðum standi, fyri bert 1.000 kr.
Tlf. 56852

COMMODORE 65
v/ bandupptakara og joystick + fleiri spel bíliga til sølu.
Tlf. 75195

TIL SØLU
Ein »Star nr. 10 Matrix printari« bíliga til sølu.
Tlf. 43040, eftir kl. 18

Tónleikur

TIL SØLU
Eitt D-E-C bilstereoanlegg við CD box (10 disk.), radio + bandupptakara og 120 w hátalarum til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 56272

SUPER GOTT ANLEGG
JVC tunari, JVC forsterkari, Sony bandupptakari (nýggjur), 2 sera góðir Jamo hátalarar bíliga til sølu.
Tlf. 18813

TIL SØLU
2 JBL L 96 hátalarar til sølu fyri 2.000 kr. stk.
Tlf. 18227

TIL SØLU
Ein bandleysur Fender Jazz Bass til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 19030
Tlf. 15433/64, arb.

TIL SØLU
Klassiskur guittari til sølu fyri 950 kr.
Tlf. 19030
Tlf. 15433/64, arb.

YNSKIST
Lítið, komplett sanganlegg ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 19030
Tlf. 15433/64, arb.

EL YAMAHA ORGUL
við rútmubox, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 13940

TIL SØLU
Lítið brúktur cd-spælari í góðum standi til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 32551

TIL SØLU
Hohner PSK 50 keyboard, 32x94, 61 tangentar, til sølu við fóti fyri 1.500 kr.
Tlf. 21432

Ymiskt

ARBEIÐI SØKIST
Ung genta ynskir eitthvørt arbeiði í Havn.
Tlf. 16221, best millum kl. 12 og 13

UMBÝTI
10 kr. seðlar verða býttir um við 5 kr. seðlar.
Tlf. 4798 1575

BRENNIKETIL
til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 74199

TIL SØLU
Lítið brúkt roknimaskina av slagnum HP 28 S til sølu fyri 1.300 kr.
Tlf. 10960

SUMMARHÚS VIÐ HUNDESTED
Álítandi føroyingur átekur sær at gera húsini í stand til summarið og gera annað fyrifallandi arbeiði.
Tlf. 4798 1575

TILBOÐ YNSKIST
uppá at leggja nýtt tak á hús.
Tlf. 11649

FARTELEFON
2 stk., 1 nýggj og 1 brúkt, til sølu.
Tlf. 84348